**Café Natúr**

Hóskvøldið 8. november
spæla
Sámal & Ronnie

**Minnist** til
**J-dagin**
fríggjadagin
**kl. 16.00 - 17.00**

livandi tónleikur
CAFE NATÚR
Tlf. 31 26 25

Sosialurin 311820






**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820



**Sandoyar Kvøldskúli**

Treytað av nóg stórari undirtøku og myndugleikanna góðkenning verður skeið í seyming.

Tilmelding á tlf. 361552.

**Sandoyar Kvøldskúli**



**Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,**

**sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14**

**Prentmiðstøðin**


## HT-open 2001

Opin talvkapping verður í hølum Havnar Telvingarfelags komandi tvær vikurnar.

1. umfar: 12/11-2001 kl. 18.00
2. umfar: 13/11-2001 kl. 18.00
3. umfar: 14/11-2001 kl. 18.00
4. umfar: 15/11-2001 kl. 18.00
5. umfar: 19/11-2001 kl. 18.00
6. umfar: 20/11-2001 kl. 18.00
7. umfar: 21/11-2001 kl. 18.00
8. umfar: 22/11-2001 kl. 18.00
9. umfar: 23/11-2001 kl. 18.00

Virðislønir: Nr. 1: 3000 kr.
Nr. 2: 2000 kr.
Nr. 3: 1000 kr.

Besti unglingur: 1000 kr.

Kappingin er ratað.

Tíðin er 2 tímar til 40 leikir og síðani 1/2 tími til rest. Luttøkugjaldið er 150 kr fyri vaksin og 50 kr. fyri unglingar.

Limir Havnar Telvingarfelags, ið hava goldið limagjald, luttaka ókeypis.

**Havnar Telvingarfelag**


**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 325 Navn: Sp/f Frá 30. oktober 2001

Adressa: SMS, Trapputrøðin, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 30.10.2001
Viðtøkudato: 30.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F Griffilin, Trapputrøðin, 100 Tórshavn (P/F 1825)
Stjórn: Kári Justinussen, Tórugøta 18, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 30.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað virksemi, sum hevur samband við hesa vinnu.

Skráseting Føroya tann 6. november 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 324 Navn: Sp/f Hvalurin Adressa: Ravnsoyargøta 1, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 08.10.2001
Viðtøkudato: 08.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Jóhannes Eli Bogi Poulsen, Ravnsoyargøta 1, 100 Tórshavn og Jens Ingolf Poulsen, Garðsgøta 23, 160 Argir.
Stjórn: Jóhannes Eli Bogi Poulsen, Ravnsoyargøta 1, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 08.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip, handil og aðra vinnu í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. november 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 325 Navn: Sp/f Frá 21. juni 1954

Adressa: Í Svanga 23, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 05.11.2001
Viðtøkudato: 05.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Pætur Martinsson Hansen, Í Svanga 23, 100 Tórshavn.
Stjórn: Pætur Martinsson Hansen, Í Svanga 23, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 05.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka framleiðslu, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 7. november 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3248 Navn: Sp/f Bósdalafossur

Adressa: 370 Miðvágur

Kommuna: Miðvágs Kommuna
Stovningardato: 24.10.2001
Viðtøkudato: 24.10.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Sonnfinnur Ellefsen, 370 Miðvágur.
Stjórn: Sonnfinnur Ellefsen, 370 Miðvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 24.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. november 2001

Kristin Balle

---



# All That Rain leggur aftur til brots



*Soleiðis sær All That Rain út í nýggju útgávuni. Hans Ravnsfjall er nýggjur sangari og gittarspælari í bólkinum. Mynd: Jonhard Hammer*

**Fríggjakvøldið spælir All That Rain fyri fyrstu ferð alment, síðani sangarin og gittarspælarin í bólkin varð skiftur. Framførslan verður á Platform í Havn**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

All That Rain fer fríggjakvøldið at spæla fyri fyrstu ferð, síðani Hans Ravnsfjall loysti Jens Marna Hansen av sum sangara og gittarspælara í bólkinum.

Seinastu vikurnar hevur nýggja manningin í All That Rain vant dúgliga saman, og fríggjakvøldið kunnu fólk hoyra úrslitið av hesum venjingunum á dansistaðnum Platform í Havn.

- Bólkurin er broyttur nakað, nú vit hava fingið nýggjan sangara. Vit fara sjálvandi at spæla sangirnar av útgávuni hjá okkum, men vit hava eisini nógvar nýggjar sangir á skránni, sigur Henning Nicodemussen, trummuspælari í bólkinum.

Leygardagin verður leiðin løgd til Klaksvíkar, har All That Rain fer at spæla í Klaksvíkar Klubba leygarkvøldið.

# Clickhaze biðin aftur til Nibe

*Clickhaze gjørdi vart við seg á Nibe Festivalinum í summar, og nú hava tey fingið møguleikan at sleppa aftur til Nibe at spæla*



**Nibe Festivalurin var so væl nøgdur við avrikið hjá Clickhaze í summar, at festivalurin hevur boðið bólkinum at koma aftur komandi ár**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Tað stendur Clickhaze frítt í boði at fara aftur til Nibe Festivalin at spæla komandi summar.

Leiðslan fyri festivalin er so væl nøgd við framførsluna hjá Clickhaze í juli mánaði, at bólkurin hevur fingið tilboð um at koma aftur til Nibe komandi summar.

- Vit hava sera góðan hug at taka av, so tað verður helst til tað, sigur Jón Tyril, gittarspælari í bólkinum.

### Nógv fáa nei

Vanliga eru einar 60 konsertir í Nibe, og tað er ein ørgynna av bólkum, sum roynir at sleppa framat, men nógvir fáa eitt nei takk. Tí er tað stórt herðaklapp hjá Clickhaze, at festivalurin sjálvur roynir at lokka tey aftur at hava konsert.

Leiðarin fyri festivalin, Peter Møller Madsen, dámar sera væl Clickhaze, og hann heldur, at konsertin við føroyska bólkinum var ein tann besta á festivalinum í summar.

Ætlanin er, at Clickhaze skal spæla á einum størri palli á festivalinum komandi summar. Í summar spældi Clickhaze í einum telti, men næstu ár verður ætlaða framførlsan á næststørsta pallinum á festivalinum.

# DJ Fuller á Platform

**Um vikuskiftið vitjar dugnaligur og royndur danskur plátuvendari á Platform í Havn**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fer danski plátuvendarin DJ Fuller at venda plátum á Platform í Havn.

DJ Fuller hevur seinastu 10 árini virkað sum DJ í Danmark og í útlandinum. Hann hevur vent plátum á einum hópi av dansistøðum í Danmark, og hann hevur eisini havt uppgávur á Kos, í Italia, Spania og Svøríki.

Fríggjakvøldið fer All That Rain eisini at spæla á Platform.

# Teitur biðin til spennandi uppgávur



**Teitur Lassen hevur fingið tilboð um at koma á konsertferð í Onglandi, og hann skal møguliga spæla saman við kendari songkvinnu á konsert í Danmark**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Teituri Lassen stendur í boði at fara á eina lítla konsertferð í Onglandi saman við kanadiska sangskrivaranum Ron Sexsmith. Hendan konsertferðin skal verða í november/desember.

Harafturat er ætlanin, at Teitur skal spæla á nøkrum konsertum í Danmark saman við amerikansku songkvinnuni Heather Nova, sum hevur givið fleiri fløgur út seinnu árini.

Teitur hevur ferðast nógv í USA og Onglandi, og hann hevur fingið nógvar góðar kontaktir. Hann hevur somuleiðis umboðsmann, sum arbeiðir fyri seg, og útgávufelagið Windswept Pacific roynir eisini at fáa hann fram.

Miðvísa arbeiðið hjá Teiti vísir seg eisini aftur í spennandi tilboðum um konsertframførslur.